## Eitt valevni í Suðuroy



Sjálvstýrisflokkurin hevur valt at stilla Eileen Sandá í Vági upp vegna Suðuroynna. Eileen er ættað úr Suðuroy, men hevur útbúgvið seg niðiri og eina tí arbeitt í Havn. Nú eru hon og maðurin flutt suður aftur, tí líkindi eru fyri fleiri størvum til útbúgvið fólk í útjaðaranum. Fyrr hevði Sjálvstýrisflokkurin truplar møguleikar undir gomlu valskipanini at fáa umboð í smáu valdømunum, men nú er framgongd væntandi undir broyttu skipanini, verður sagt í tíðindaskrivi. Sjálvstýrið hevur tó valt bert at stilla Eileen upp í Suðuroy til tess at savna atkvøðurnar um eittans valevni, so møguleikin at verða vald ella koma inn sum varaumboð á tingi verður betri.

## Íslendskur stóríleggjari ridlar

Íslendska FL group, sum millum annað er stórpartaeigari í Sterling og Royal Unibrew sigst nú vera í álvarsomum fíggjarligum trupulleikum. Felagið hevur boðað frá, at ein fíggjarlig umskipan nú verður gjørd, eins og stjórin, Hannes Smárasson, er farin úr starvi. Men danskir greinarar halda, at trupulleikin langt ífrá er loystur við hesum. Lars Christensen úr Danske Bank sigur, at krossaði eigaraskapurin hjá fleiri av fíggjarligu aktørunum í íslendska búskapinum ger, at tað ber illa til at avmarka trupulleikan til eina einstaka fyritøku. – Hækkandi rentur og fallandi partabrævakursir eru eitur fyri íslendsku íløgufeløgini, hvørs virksemi byggir á pantseting í nýggjar íløgur. Tað gongur væl, so leingi sum marknaðurin hækkar í virði, men seinastu mánaðirnar hevur hetta ikki verið gongdin, sigur Lars Christensen.

# Fella ikki stjórnina

**- Eg haldi ikki, at viðurskiftini eru nakað boytt, eftir at Pia Christmas-Møller hevur tikið seg úr konservativa fólkatingsbólkinum. Og eg verið í hvussu er ikki við til at fella eina borgarliga stjórn, sigur Kaj Leo Johannesen**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í gjár gjørdist greitt, at Kaj Leo Johannesen fer at taka sæti á Fólkatingi fyri Edmund Joensen, sum annars er fyrst valdur á sambandslistanum. Edmund Joensen er sum kunnugt formaður á Føroya Løgtingi, og hann kann tí ikki røkja bæði størvini.

Nú hevur Edmund Joensen so gjørt av, at fullføra arbeiðið sum tingformaður, og hevur tí biðið næsta mann á listanum røkja fólkatingsstarvið hesa tíðina fram til valið, sum væntandi verður 19. januar komandi ár.



*Kaj Leo Johannesen skal røkja starvið sum fólkatingslimur fram til føroyska løgtingsvalið, sum væntandi verður 19. januar.*

Hesi tíðindi vórðu neyvan komin alment fram, fyrr enn tað frættist, at fyrrverandi formaðurin í Konservativa flokkinum í Danmark, Pia Christmas-Møller, hevur tikið seg úr fólkatingsbólkinum hjá flokkinum, og nú verður leysgangari á Christiansborg.

Reint tekniskt merkir tað, at atkvøðan hjá Sambandsflokkinum á Fólkatingi nú ikki longur er hin 90'instjúgunda, men hin 89'instjúgunda. Men av tí at Christmas-Møller eisini hevur boðað frá, at hon kortini fer at stuðla stjórnini, heldur Kaj Leo Johannesen ikki, at støðan er nakað broytt.

- Eg fari framvegis at arbeiða eftir tí leisti, sum Sambandsflokkurin hevur samtykt í samráð við Vinstra, og sum eisini er í tráð við valskránna hjá okkum til fólkatingsvalið, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Cleara um neyðugt

Sum flest allir aðrir føroyskir flokkar boðaði eisini Sambandsflokkurin frá upp undir fólkatingsvalið, at teir ikki ætlaðu at blanda seg í danskan innanríkispolitikk. Og tað er framvegis ætlanin. Men hinvegin fer Kaj Leo Johannesen ikki at fella eina danska borgarliga stjórn.

- Tað er bara neyðugt hjá mær at blanda meg í danskan innanríkispolitikk um so er, at hin føroyski fólkatingslimurin ger tað. Men so er tað eisini klárt, at eg fari at cleara hansara atkvøðu, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann heldur kortini, at ein slík støða ikki kemur upp á tal.

- Ikki, um Tjóðveldi heldur síni lyftir um ikki at blanda seg í danskan innanríkispolitikk, sigur nýkosni føroyski fólkatingslimurin fyri Sambandið.

Hann vísir annars á, at nógv er at gera í løgtinginum í løtuni, og tá tað arbeiðið er liðugt, stendur eitt valstríð fyri durum, sum sjálvandi fer at krevja sína tíð.

- Men vit hava avtalur um hvussu vit gera í sambandið við valstríðið. Flokkarnir hava jú vanligar clearingsavtalur sínámillum. Annars fari eg niður á fólkating í næstu viku, sigur Kaj Leo Johannesen, nýkosin fólkatingslimur.

# Fingrarnar burtur, takk



*Jørgen Niclasen heitir á føroysku fólkatingsumboðini um at halda fingrarnar burtur frá donskum innanríkispolitikki*

**Føroysku fólkatingsumboðini eiga at gera, sum tey lovaðu undan valinum, nevniliga at halda fingrarnar burtur frá donskum innanríkispolitikki, sigur Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú er komi fram, at danska andstøðan í fólkatinginum er komin við uppskoti um at gera eina kanning av danska lutinum í Irak krígnum.

Tað mugu teir so sjálvir um, men tað er ógvuliga ódámligt, at eitt føroyskt umboð er at finna millum uppskotsstillararnar saman við báðum teimum grønlendsku umboðunum, sigur Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum.

Hann heldur ikki, at tað tænir virðingini fyri Grønlandi og Føroyum, at fólkatingslimir úr londunum báðum blanda seg beinleiðis í danskan politikk.

Danir valdu ein borgarligan meirluta í Fólkatingið. Tí líkist tað ongum, at føroyskur tjóðveldisosialistur letur seg brúka til at skeikla hesa demokratisku avgerð hjá dønum, heldur Jørgen Niclasen.

Tað var í valstríðnum ført nógv fram frá nærum øllum flokkum, at føryingar áttu ikki at blanda seg í danskan innanríkispolitikk. Men tað heldur Jørgen Niclasen, at umboðið hjá Tjóðveldi á Fólkatingi ger, verður hann við til at stilla slíkt uppskot framm.

Sum partur av føroysku sjálvstýrisrørsluni, standi eg spyrjandi. Vit sum vilja, at í Føroyum skulu føroyingar ráða, eiga at virða dana rætt at ráða í Danmark. Alt annað er skomm, sigur hann

Hann heitir tí á bæði føroysku umboðini um at halda fingrarnar burtur frá donskum innanríkispolitikki.

Gera teir ikki tað, er alt trúvirði um, at í Danmark skulu danir ráða og í Føroyum skulu føroyingar ráða, burtur, heldur Jørgen Niclasen.